# Metkapping í Vági

**Vikuskiftið 28 og 29 aug varð metkappingin 2003/2004 hildin í Vági. Hetta er ein opin kapping, t.v.s. at svimjarar í øllum aldri kunnu luttaka. Henda kapping hoyrir tó til svimjiárið**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*

Vikuskiftið 28 og 29 aug varð svimjikapping í Vági. Hetta er ein opin kapping, t.v.s. at svimjarar í øllum aldri kundu luttaka, men tey yngstu vórðu um 12 ár.

Henda kapping hoyrir til svimjiárið 2003/2004 so svimjarar sum skullu skifta bólk fáa ein møguleika afturat at seta met í gamla bólkinum, tí verður kappingin rópt Metkappingin.

44 kappingar vórðu svomnar, og tvey nýggj bólkamet blivu sett.

Sum ikki einaferð verð tað Elspa Mørkøre úr FS í setti eitt nýtt bólkamet, og tað var í 200m frí svimjing við tíðini 2.19.3, og hitt meti setti Petur Mcintosh úr HS í 50m firvaldssvimjing við tíðini 0.31.7. Annars gjørdist úrslitið av kappingini soleiðis:

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| Nr 1 HS | 28 | 18 | 6 |
| Nr 2 FS | 15 | 11 | 8 |
| Nr 3 Flot | 2 | 3 | 12 |
| Nr 4 VS | 1 | 0 | 4 |
| Nr 5 TS | 0 | 4 | 7 |

Næsta svimjikapping verður í Klaksvík um 14 dagar, fyri bólkarnar 1-2-3. Annars á www.ssf.fo

# Christian Høgni uppá tal í B36

**Nógv bendir á, at Christian Høgni Jacobsen fer at spæla við B36 komandi kappingarár**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Hóast eingin vil vátta tíðindini enn, veit Sosialurin frá álítandi keldum, at áleyparin Christian Høgni Jacobsen eftir øllum at døma verður at síggja í hvítu troyggjuni hjá B36 næsta ár.

Christian Høgni fekk ein álvarssaman knæskaða fyrr í ár, og hann spælir tí ikki fótbólt aftur í ár. Felag hansara Vejle boðaði tá frá, at tað ikki vildi leingja sáttmálan, sum Christian Høgni hevði við felagið.

Hetta hevur við sær, at áleyparin nú leitar sær heimaftur á klettarnar. Christian Høgni segði í Útvarpi Føroya fríggjakvøldið, at hann kom heimaftur at spæla, men hann vildi ikki gera nakrar viðmerkingar til spurningin, hvat felag hann fór at umboða.

Formaðurin í B36, Kristjan á Neystabø, vil hvørki vátta ella avsanna tíðindini um hetta leikaraskiftið. Eitt kann tó sláast fast, og tað er, at feløgini longu eru farin undir fyrireikingarnar til komandi kappingarár, og at samband hevur verið millum B36 og Christian Høgna.



*Christian Høgni Jacobsen verður eftir øllum at døma at síggja í álopinum hjá B36 komandi kappingarár*

*Savnsmynd*

Framherjin á landsliðnum hevði júst funnið máltevið í donsku 1. deild, tá hann meiddi sær knæið, og tí kom skaðin serliga illa við hjá honum. Hann var toppskjútti hjá Vejle um hetta mundið.

Eingin ivi er um, at hetta er ein styrkur hjá B36. Um John Petersen verður verandi í B36, kunnu teir báðir gerast eitt vandamikið álopspar.

# Spæla mitt í viku

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Bara ein dystur var á skránni í bestu íslendsku fótbóltsdeildini sunnudagin. ÍBV hevði á Heimey vitjan av Víkingi, sum ikki er væl fyri í botninum. Víkingur fór longu leiðina úr oyggjunum og til Reykjavíkar við 3-0 tapi.

Í gjárkvøldið vóru tríggir dystir í sekstanda umfarinum á skránni. Tá var skráin henda: Fylkir-KA, Grindavík-FH og ÍA-Keflavík. Sambært skránni skuldi Fram-KR eisini verið spældur í gjárkvøldið, men tann dysturin er fluttur til í kvøld. Sambært okkara upplýsingum er Fróði Benjaminsen leikbannaður ímóti KR, og Hans Fróði Hansen er ikki á liðnum.

Við sannførandi sigrinum á Víkingi lyfti ÍBV seg fram í ovasta plássið. Men FH legði seg aftur fremst, um teir í gjárkvøldið fingu stig ímóti Grindavík. At Víkingur tapti í oyggjunum ber við sær, at Fram kann sleppa upp um strikuna, um teir vinna býaruppgerðina ímóti KR.

**jh**

# HB og Heine halda fram

VENJARASTARV
*Stefan í Skorini*

Venjaraspurningurin hjá HB komandi kappingarár er svaraður. Heine Fernandez og HB hava gjørt av at halda fram við samstarvinum eitt ár afturat. Leygarkvøldið skrivaðu Birgir Enghamar, formaður í Havnar Bóltfelag, og Heine Fernandez undir eina eitt ára avtalu.

Heine Fernandez hevur verið leikandi venjari í ár, og hesum leiklutinum heldur hann væntandi fram í. Partarnir eru væl nøgdir við úrslitini higartil í ár, og tí gjørdi nevndin í HB av at leingja samstarvið.

Heine Fernandez hevur havt góð úrslit við HB í ár eftir eina heldur trilvandi byrjan. Á ólavsøku vann HB løgmanssteypið, og í løtuni liggur HB sera væl fyri í oddinum í 1. deild.



*Birgir Enghamar, formaður í HB, og Heine Fernandez hava júst skrivað undir sáttmálan, sum hevur við sær, at Heine Fernandez heldur fram í HB komandi kappingarár*

*Mynd: www.hb.fo*


**Sosialurin** hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00

fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo

teldupostur: post@sosialurin.fo





## Bilar til sølu

**Opel Astra 1.6 bensin**



· Árg. 2001 · Km. 40.000
· Rustviðjørdur · Originalt anlegg við fløguspælara · Originalar 15" sportfelgur · Krók · Vælhildin.

prísur **99.500,-**

**Nissan Almera 1,5 bensin**



· Km. 23.000 · El-rútar framman
· El-spegl · hita í setrum
· Anlegg við fløguspælara

prísur **135.000,-**

**Fiat Stilo 1,8i bensin**



· Árg. Juni 2002 · Km. 51.000
· El-rútar framman · Aircondition
· Tripteldu · ASR (antispin)
· Originalt radio við fløguspælara
· 2 hurðar · Forkromaðar sportfelgur 17'' við góðum dekkum
· Góð píkadekk á felgum · Vælhildin

prísur **160.000,-**

**Opel Vectra 1.6 bensin st. car persónbilur**



· Árg. aug. 2001 · Km. 46.045
· Aircondition · Radio · Bagaguskjúlara · Takboylar · Vælhildin.

prísur **158.500,-**

**Kia Clarus 2,0 bensin**



· Árg. juli 1997 · Km 125.000
· El-rútar framman · Fjarstýrt centrallás · Pioneeer anlegg
· Sportfelgur við góðum summardekkum, góð píkadekk fylgja við
· Vælhildin.

prísur **85.500,-**

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tel 31 10 13 · Fartel 51 10 13
Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

**Sálarfrøðistovan**
Hoyvíksvegur 65
Postboks 3134 · 110 Tórshavn

Bílegging av viðtalu
kl. 8.00 - 9.30
gerandisdagar
á tel 310335

**Kári Leivsson**
Autoriseraður sálarfrøðingur
- umfataður av sjúkrakassasáttmála

**Starvslýsing**

Søkt verður eftir dugnaligum, fólki við handilsroyndum at arbeiða 3/4 tíð í gávubúð okkara.

Prógv, ummælið o.a. verða at senda innan 10.sept. 2004 til:

Thomas Dam á Hálsi,
Postboks 2148
110 Tórshavn.

Eru spurningar ring: 266777

Thomas Dam á Hálsi



**Ellis- & avlamisheimið í Vágum**

## Starvsfólk til røktina

**Sjúkrarøktarfrøðing** til fast hálvtíðarstarv í skiftandi vaktum, í løtuni mest seina vakt og dagvakt, at byrja skjótast tilber.
**Sjúkrarøktarfrøðing** til farloyvisstarv á 0.7 í skiftandi vaktum frá 1. okt. 04. til 1. febr. 05.

Dentur verður lagdur á at umsøkjarin hevur góð samstarvsevni, hevur hegni og hug at veita brúkaranum eina góða tænastu, sambært teim møguleikum, ið eru.

Umsókn við neyðugum prógvi v.m. verður at stíla til stýrið og senda til heimið áðrenn 16. sept. 04.

Lønartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi felag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran fyri heimið tilf. 332600/601.

**P. S. Gerast umsóknirnar ov fáar frá sjúkrarøktarfrøðingum, eru onnur røktarstarvsfólk vælkomin at søkja ístaðin til eitt tíðaravmarkað vikariat uppá 4 mánaðir.**

**Postverk Føroya**

## Postboðavloysari m/k

### til posthúsið í Miðvági

Søkt verður eftir einum tímaløntum avloysara m/k at bera post út í Miðvági skjótast møguligt.

Arbeiðið fevnir um avloysing í postútberingini í sambandi við frítíð, sjúku og aðra fráveru.

Viðkomandi má vera røkin, álítandi og kundavinarligur.

Nærri um arbeiðið fæst at vita frá posthúsleiðaranum í Miðvági.

Løn eftir sáttmálanum millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Skrivlig umsókn við møguligum tilmælum verður at senda til:

**Postverk Føroya**
**Avgreiðsla og Søla**
**Óðinshædd 2 · 100 Tórshavn**

W W W . S O S I A L U R I N . F O

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**800 Tvøroyri**

## Sjúkrarøktarfrøðingar og Sjúkrahjálparar/-heilsuatstøðingar

Tvey størv sum sjúkrarøktarfrøðingur, uppá fulla tíð eru leys til setan frá 1. oktober 2004.

Eitt starv sum sjúkrarøktarfrøðingur, við einari arbeiðstíð uppá 0,5 er leyst til setan frá 1. oktober 2004.

Tvey størv sum sjúkrahjálparar/heilsuatstøðingar, við einari arbeiðstíð uppá 0,7 eru leys til setan frá 1. oktober 2004.

Løn og setanartreytir sambært sáttmálum millum avvarðandi fakfeløgum og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna Sunnevu Petersen tlf. 371666 lokal 147.

Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

**Suðuroyar Ellis- og Røktarheim**
Postrúm 51
800 Tvøroyri.

innan 15. september 2004.

## REIN LUFT ER SUNN FORNUFT
- eisini á arbeiðsplássinum



Rein luft gevur tað besta arbeiðsumhvørvi og bestu inniluft

Reinsa luftina effektivt við elektroniskum luftreinsara frá OptimAir.

**Vánalig inniluft á skrivstovum vísur seg sum eitt ella fleiri av fylgjandi:**
· Slímhinna ampa í eygum, nøs og svølg
· Húð ampa
· Høvuðpína
· Møði
· Konsentratióntrupulleikar
· Svimbul

Hesir trupulleikar eru oftani tí støði av skaðiligum partikklum í luftini er ov høgt. Men hetta verður tikið burtur við luftreinsara frá OptimAir.

Bíða ikki til starvsfólkini byrja at verða ússalig. Men bílegg eina royndaruppseting á tlf. 50 55 55 ella á optimair@email.fo

**Optimair stendur fyri:**
· rein luft er skilagott
· nýggjasta tøkni
· góð kundatænasta
· bíligt viðlíkahald
· lágt ljóðstøði
· lága streymnýtslu
· bíligur rakstur
· lagaligur prísur
· ókeypis royndaruppseting

Reinsar upp til 450 m3 um tíman
Sera vælegnaður í roykirúminum

**Les meira á www.optimair.dk**

**Prísir úr 11.995 kr u/mvg**



**Ókeypis uppseting, alt ið krevst er 1 elstikk og 2 skrúvur**
**10 dagar óbindandi royndartíð**

OptimAir
OptimAir Føroyar v/Karl Christiansen
N. Finsensgøta 48 · 100 Tórshavn
Tel 311870 · Fartel 505555 · optimair@email.fo

www.sosialurin.fo